## DAGSINS MEINING

# Gløgt er gestsins eyga

Tað er altíð áhugavert at fáa viðmerkingar frá fólki, ið síggja mál úr einum øðrvísi sjónarhorni, enn vit gera her í Føroyum. Fyrrverandi danski løgmálaráðharrin og fyrrverandi formaðurin í danska Konservativa flokkinum Hans Engell hevði eina áhugaverda viðmerking um fólkatingsvalið í Tinghellini í Sosialinum í gjár.

Eitt tað mest áhugaverda í greinini er, hvussu munurin er á mátanum Tjóðveldisflokkurin sær sína umboðan í Fólkatinginum, og hvussu ein framstandandi dani sær hana. Tjóðveldisflokkurin tosar um, at hann hevur vunnið sær virðing á Fóllkatingi. Hans Engell sigur júst tað øvugta. Hann sigur at Tjóðveldisflokkurin hevur sett seg uttan fyri ávirkan og verður ikki tikin alvorligt - "For megen snak og for få resultater". Ov nógvur gangur og ov fá úrslit eru orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin stendur uttanfyri alla ávirkan í Føroyum, og tað er áhugavert at síggja, at teir eisini hava megnað at sett seg uttanfyri í danska Fólkatinginum.

Tað er ikki so løgið, at man ikki verður tikin alvorligt, tá man yvirfóðrar við fyrispurningum niðri á fólkatingi. Hvussu alvorligt verður fyrispurningur nummar 67 tikin, tá man hevur avskotið 66 fyrispurningar í tættari raðfylgju frammanundan? Høvdu føroyingar ikki verið betri tæntir við eina umboðan, ið kanska segði eitt sindur minni, men harafturímóti fekk oyrað hjá øllum donskum politikarum, tá okkurt varð sagt? Hevði tað ikki verið ein betri arbeiðsháttur, og tá kundi man av røttum breitt seg við slagorðinum: ein, sum arbeiðir.

Hvat ger so Tjóðveldisflokkurin við hetta? Hann ætlar sær eftir øllum at døma einki at broyta. Orsøkin til politisku isolatiónina í Føroyum hava øll onnur skyldina av, og tað tykist sum um at man roynir at billa veljarunum inn, at man verður tikin alvorligt niðri á Fólkatingi, hóast alt bendir á tað øvugta. Samráðingarleisturin hjá undanfarnu samgongu bygdi á eina ætlan hjá Tjóðveldisflokkinum. Har kom einki burturúr uttan rumbul í nøkur ár, og tí er tað løgið, at politiskt einsamalli Tjóðveldisflokkurin ikki tekur í egnan barm og broytir sína framferð. Tjóðveldisflokkurin dugdi einaferð at samráðast og røkka úrslitum, og løgið er, at man ikki hyggur eftir, hvat man gjørdi rætt tá. Núverandi floksformaðurin kundi kanska spurt t.d. Finnboga Ísakson og Signar á Brúnni, hvussu man røkkur politiskum úrslitum. Gamaní var talið av yvirskriftum og talið av fyrispurningum lægri tá enn nú, men talið av úrslitum var væl hægri, og man tað ikki verða tað, ið telur í longdini?

So leingi Tjóðveldisflokkurin definerar veruleikan, sum man ynskir at hann skal síggja út, heldur enn at laga seg til hann, sum hann nú einaferð sær út, so kemur hesin flokkur at standa uttanfyri ávirkan í Føroyum eins væl og á Fólkatingi. Man kan royna at manipulera við veruleikanum, men fyrr ella seinni kemur rætta myndin fram. Tað er spell, at Tjóðveldisflokkurin framhaldandi gongur isolatiónsleiðina. Spell, tí at flokkurin plagdi at verða førur fyri at geva eitt gott íkast til politisku gongdina í Føroyum. Spell, tí at flokkurin er við til at undirminera føroysku ávirkanina á Christiansborg.

Virðing frá øðrum, er ikki nakað, man sjálvur tekur sær. Tað er nakað man fær, um tað er uppiborið, og tað eiga onnur enn ein sjálvur at døma um. Gløgt er gestsins eyga.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið 2005

**Andrias Petersen**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



VAL05

Høvuðsuppgávan hjá komandi føroysku fólkatingsumboðunum verður at ávirka donsku politisku skipanina til fyrimun fyri Føroyar á trimum økjum:

- Yvirtøkulógina
- Uttanríkispolitisku heimildirnar
- Umboðanina í Norðurlandaráðnum

Ein breiður meiriluti á Føroya Løgtingið við trimum av teimum fýra stóru flokkunum samdust í januar í fjør um at fáa loyst tað ríkisrættarligu støðuna, sum fløkja hevur verið í síðan ’98.

Eitt umboð fyri javnaðarflokkin vil við ágrýtnið og hampuligheit ávirka donsku fólkatingslimirnar og harvið donsku stjórnina, soleiðis at hetta verður loyst til fyrimun fyri okkum.

Vit mugu ásannað, at verandi støðað, har tað ríkisrættarliga fyllir alt ov nógv á tí politiska pallinum ikki kann halda áfram nú 6. árið á rað uttan at finna eina loysn, og eftir okkara tykki er loysnin at hóma við støðið í heimastýrislógini og mýkjan av donsku grundlógini. Hetta seinna hava danir tey seinastu árini fleiri ferðir gjørt í samband við EU, so tað eigur eisini at bera til við atlitið til okkum í Føroyum.

Viðvíkjandi umboðanini í Norðurlandaráðnum kemur hetta helst at taka nakað longri tíð, tí her er tað ikki bert danir í skulu broyta støðu, men eisini sviar og norðmenn, tí hesi seinru hava trupuleikar við umboðanini hjá samunum í Norðurnoreg og Norðursvøríki. Samarnir her hava sett fram territorialkrøv, tvs. krøv um ognarrætt til landaøkir í omanfyrinevndu londum og hesum krøvum vilja norska og svenska stjørnin ikki ganga á møti, tí tað hóttir eindina í londunum.

Fær javnaðarflokkurin umboðan á fólkatingið vil hann áhaldandi royna at ávirka danska politiska systemið, soleiðis at tey trý omanfyrinevndu mál verða loyst til fyrimun fyri Føroyar.

VAL05

# Javnaðarhugsjónin og leiklutur hennara í altjóða samfelagnum

**Sylverius Jacobsen**
*Javnaðarflokkurin*

Góðu veljarar og góðu føroyingar!

Javnaðarhugsjónin hevur haft altavgerðandi týdning fyri samfelagsmenningina í heiminum og einahelst í Europa. Javnaðarhugsjónin hevur sín uppruna í byrjanini av ídnaðarsamfelagnum, har henda politiska rørsla saman við fakfeløgunum stríddist fyri rættindum hjá vanliga fólkinum - ikki bara um løn, men eisini um rættindi til útbúgving, góð heilsuviðurskifti og trygd í aldurdóminum og so framvegis.

Hugsjónin byggir á, at tað einstaka menniskja skal hava møguleikar fyri frælsi og fyri at mennast mentanarliga og socialt undir tryggum viðurskiftum. Hugsjónin byggir á eitt frælst vinnulív, men har tað almenna setir treytir, soleiðis at tað verður pláss fyri øllum at mennast og at teir samfelagsskaptu ágóðarnir verða býttir so javnt sum møguligt til frama fyri heildina.

Alt seinasta árhundrað var javnaðarhugsjónin tann mest máttmikla politiska hugsjónin í Norðureuropa og tað er henni at takka fyri, at hesin partur av heiminum verður mettur at vera tað besta og tryggasta stað at liva í.

Tann socialdemokratiska hugsjónin var eitt bólverk móti kommunismuni, og har javnaðarhugsjónin vann sær festi í samfelagnum, formáddi kommunisman sær einki.

Vit síggja at fleiri og fleiri av teimum eystureuropæsku londunum, sum í eitt hálvt árhundrað vóru kúga av kommunismuni, fóru heilt til høgru hugsjónarliga, men nú venda aftur til tær socialdemokratisku hugssjónirnar. Hetta er ein ásannan av, at javnaðarhugsjónin gevur tað besta og rættvísasta býti av samfelagsligságóðunum og gevur flestu og bestu framtíðarmøguleikarnar til tað vanliga fólki.

Nú vit eru farin inn í 21. øld stendur javnaðarhugsjónin líka sterk og verður nýtt sum fyrimind úti í heimi, har man roynir at byggja góð og trygg samfeløg við góðum og tryggum menningarmøguleikum.

Føroyski javnaðarflokkurin hevur altíð haft gott samstarv við teir norðurlendsku javnaðarflokkarnar og serliga tann danska javnaðarflokkin av góðum grundum. Vit eru jú í ríkisfelagsskapi. Hetta samstarv kemur at halda fram og helst at mennast nú heimurin verða alt meira altjóðagjørdur. Tað er umráðandi, at politisku hugsjónirnar verða samansjóðaðar, soleiðis at lógir og reglugerðir, sum fyrr bert vóru galdandi í einum landi, nú alt meira verða settar í millumtjóða og altjóðasáttmálar.

X við lista C.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.